# Valsur, tango og lættur klassiskur tónleikur í Vágsbotni og REX

Ad Libitum spælir fríggjakvøldið 27. mai til konsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni og seinni til dans í Rex Culture Club, og hóast navnið Ad Libitum sjáldan hevur verið á breddanum seinastu árini, er hetta hvørki eitt kombakk ella ein endabrestur. Ad Libitum livir og hevur tað gott




TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Chrstian Poulsen (caracas), Niels Símun Johannesen (bass), Hans Christian Clementsen (gittar), Thomas Michael Smith (mandolin), Finnbogi Johannesen (gittar) og Poul Engberg Poulsen (mandolin og klokkuspæl) stovnaðu bólkin í 1973.

### Spæligleðin er drívmegin

Talan hevur sambært Thomas Michael Smith ongantíð verið um nakran slóðbrótandi bólk, løgini hava ongantíð verið sjálvgjørd, og útsetingarnar hava heldur ikki verið nýskapandi.

Men spæligleðin og hugurin hava verið drívmegin. Teir hava altíð hugnað sær saman. Teir hava spælt kring allar Føroyar onkuntíð á konsertum og onkuntíð til dans, men oftast til hugnakvøld. Tónleikurin fevnir m. a. um valsir og tango. Men eyðkennislagið hjá bólkinum er Menuett í G av Ludvig van Beethoven. Hetta stykkið hava teir spælt heilt síðan byrjanina, og teir gera tað enn.

### Ikki eitt kombakk

Manningin er eitt sindur broytt hesi 22 árini, men hevur verið rættuliga støðug síðan miðskeiðis í 80'unum. Thomas Michael Smith og Hans Christian Clementsen eru enn við, afturat teimum eru Svenn Brimheim (gittar), Heðin Thomsen (mandolin, harmoniku) og Fróði Sandoy (bass). Fróði Sandoy spælir hetta kvøldið við bólkinum, men skiftist annars við Kolbein Simonsen um at røkja hetta plássið í bólkinum.

Hetta er ikki eitt kombakk. Tí sjálvt um bólkurin seinnu árini ikki hevur verið so virkin, so venja teir umleið einaferð um mánaðan, og bólkurin er enn eitt hugnarligt frítíðarítriv. Teir hava næstan øll árini verið at hoyrt onkuntíð eitt nú á konsertum í útvarpinum, í Norðurlandahúsinum saman við Tórshavnar manskóri og umborð á Norðlýsinum.

### Fingu eitt ur

Thomas Michael fortelur, at hann og Heðin eitt árið spældu fyri russiskum politikarum umborð á Norðlýsinum, og russiski fiskivinnumálaráðharrin varð so glaður um tónleikin, at hann foreardi teimum eitt dýrt ur.

### Eitt sprell

Seinasta árið hevur bólkurin spælt tvær ferðir, fyrst í Vági í fjør heyst, og síðan í januar á Tvøroyri. Bæði tiltøkini gingu væl. Thomas Michael Smith sigur við Sosialin, at konsertin og dansurin skulu skiljast sum eitt sprell. Ein roynd at vísa